gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Bensin á bálið

Tjóðveldisflokkurin megnaði í fyrstu atløgu at forða fyri, at bensinprísurin lækkar, og Fólka flokkurin lat seg aftur eyðmýkja, tá hann atkvøddi fyri uppskoti frá Tjóðveldisflokkinum at koyra málið aftur í nevnd. Grundgevingarnar hjá Tjóðveldisflokkinum fyri ikki at atkvøða fyri uppskotinum hjá Javnaðarflokinum eru partvíst, at samgongan hevur ikki viðgjørt andstøðumálið, og partvíst, tí at fyrilit skulu takast fyri landsbúskapinum.

Taka vit tað fyrru grundgevingina fyrst, hevur landsstýrismaður hjá Tjóðveldisflokkinum lagt fleiri uppskot fyri tingið, utttan at samgonguflokkarnir høvdu viðgjørt uppskotinum saman ella í flokkunum. Henda grundgevingin heldur sostatt ikki. Viðvíkjandi tí búskaparliga spurningin, so hevur eitt minni gjald á bensinið við sær, at inntøkan til landskassan minkar nakrar milliónir, og nakrir bileigarar hava eitt sindur meiri pening til taks.

Ein stórur partur av teimum nýggju bilunum hava í dag teir dálkandi diselmotorarnar. Tey, sum annaðhvørt ikki hava havt ráð at skifta bil, ella hava keypt gamlar bilar, hava framvegis bilar við bensinmotori. -Hvørjir eru hesir bileigararnir fyrst og fremst? Hugsast kann, at tað er tann vanligi løntakarin, sum hevur sítt stríð at fáa endarnar at røkka saman. Aftur eitt dømi um, at vanligi løntakarin skal bera búskaparligar byrðar og ábyrgd!

Tað er alla æru vert, at Tjóðveldisflokkurin leggur dent á at reka ein varligan búskaparpolitikk og hevur í hyggju, at buúskapurin ikki fer í kók, men tað er løgið, at tað bara er vanligi løntakarin, sum kann brúkast at repa við! Tjóðveldisflokkurin setti føtur íspennið ímóti at lækka skattin hjá meðal løntakaranum. Hann var ímóti at varðveita rentufrádráttin á 48 prosentum. Og hann hevur verið ímóti at lækka oljugjaldið og bensinprísin!

Fólkaflokkurin hevur verið fyri hesum uppskotum, tá tey hava verið til 1. viðgerð, men hann hevur latið seg eyðmýkjað hvørja ferð. Hann hevur atkvøtt ímóti, og gjørt sín og samgongupolitikkin til skammar. Samgongan setti sær jú fyri at lækka skatt og avgjøld, og eisini virka fyri at lækka gjaldið á orku, sum dálkar minni! Tí kann staðfestast, at politikkurin Fólkafloksins um minni skatta- og avgjaldstrýst er einki annað enn lótir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fasta sambandið um Leirvíksfjørð og lønarhækkanin

**Bjarni Djurholm**
*landsstýrismaður*



– Enn er eingin politisk avgerð tikin um, nær farast skal undir fasta sambandið um Leirvíksfjørð.

Um fasta samband um Leirvíksfjørð er í samgonguskjalinum felt á blað, at "....kanningar í samband við farleiðina um Leirvíksfjørð halda fram".

Undan jólum í fjør fekk undirritaði handað notat frá P/F Vágatunnil um fast samband um Leirvíksfjørð. Notatið varð borið Landsverkfrøðinginum til eftirmetingar, og stutt aftaná ársskiftið svaraði LV við einum samandrátti, har m.a. varð skotið upp at gera teknisku forkanningarnar í 2001.

Í fíggjarlógini er ásett, at gera somu forkanningar í ár og næsta ár.

Notatið frá P/F Vágatunnilin og eftirmetingin frá LV varð borið landsstýrismonnunum um mánaðarskiftið janur/februar 2001. Mælt varð til, at forkanningarnar verða gjørdar í ár og seta neyðugu upphæddina á eykajáttanaruppskotið fyri mars.

Undirritaði var, saman við hinum landsstýrismanni fólkafloksins, burturstaddur, tá politiska viðgerðin var av tilmælinum. Niðurstøðan er tó greið. Tjóðveldisflokkurin og sjálvstýrisflokkurin tóku undir við at játta kanningarpeningin í ár.

Higartil hevur eingin politisk viðgerð verið av fremjanini av fasta sambandinum um Leirvíksfjørð. Tí er heldur eingin avgerð tikin nær farast skal undir hesa verkætlan. Forkanningararbeiðið, sum ætlandi verður í ár, er tí at rokna sum fremjan av setninginum í samgonguskjalinum.

Íløgur landsstýrisins skulu vera niðanfyri 180 mio. kr árliga. Tí er neyðugt at endurskoða langtíðaríløguætlanina og forhála summar íløgur, verða aðrar framskundaðar. Hetta er ikki minst neyðugt, nú viðtikið er at byggja Suðuroyarskip fyri uml. 300 mio. kr umframt, at neyðugt verður at betra um atløguviðurskiftini á Tvøroyri og framskunda hesa íløgu, sum kostar millum 50 og 75 mio. kr.

Nú frættist, at støðið er lagt fyri lønarhækkanina í komandi lønarskeiði. Henda hækkan fer sum frálíður at kosta landskassanum útvið 200 mio. kr. árliga, svarandi til íløgukostnaðin av einum undirsjóvartunnli undir Vestmannasundi um árið. Apropos partapolitiska útgjaring, hvussu verður lønarhækkanin flokkað?

# Suðuroyggin, ein gloymdur útjaðari- eisini á páskum?

**Jenis av Rana**



Skalt tú6 til ella úr Suðri á páskum, so hevur tú ikki nógvar møguleikar í at velja. Til Suðriar sleppur tú hóskvøld kl. 19.00, men velur tú at bíða til páskaaftan, já so mást tú bíða í samfullar 49- fýratiníggju -tímar- til leygarkvøldið kl. 20.00, og tá verður tú í oynni út móti miðju nátt!! Og skalt tú av oynni, er bíðitíðin 1 tíma styttri, t. e. 48 tímar, og tá skalt tú upp við daggry páskaaftansmorgun.

Man nakað fólkaslag verða so tolið og lata sær so mikið lynda sum suðringar? Stillisliga lata tey seg á hendan hátt "vanvirða", og halda tó á at trúgva teim lyftum tey fáa.

Nýggjur Smyril (og nýggjar ferjulegur) verður lovað, ein Smyril, sum skal sigla so nógv skjótari, ja so skjótt, at hann kann sigla - var tað fýra ferðir um samdøgrið, onkur skrivaði? Hvat er tað annað enn at halda fólk fyri gjøldur, tá omanfyrinevnda dømið klárt vísir, at høvuðstrupulleikin er undirmeting, tí við verðandi Smyrli, sum saktans kann sigla fleiri ferðir, unnir man Suðringum bert eina ferð- sjálvt páskaaftan.

Men frá 1. mai er alt broytt, tá siglir Smyril tvær ferðir, eisini leygardag - og spyr man hví, so er svarið, jú, tá er summartíð og fleiri fólk ferðast. Men er støðan ikki júst hin sama á páskum- at fleiri enn vanligt ferðast. Og er tað ikki júst av hesari orsøk at ferðaætlanin er broytt triðja páskadag.

Eg havi annars loyvt mær at tosa við strandferðslustjóran um hetta, og loyvi mær somuleiðis at senda hetta brævið til hansara og ovasta leiðaran á økinum - Bjarna Djurholm, landsstýrismann, við vón um at hesin eyðsýndi trupulleikin verður loystur og ferðaætlanin verður dagførd.

# Út í heim við Atlantsflog

TÍÐNDASKRIV

Atlantsflog ber í hesum døgum út faldari í hvørt hús í landinum. orin út í hvørt hús.

Í faldaranum eru ferðatilboð til tey ferðastøð, sum Atlantic Airways flýgur til, so sum Keypmannahavn og Reykjavík alt árið, Aberdeen meginpartinum av árinum, og Billund, Stavanger og London um summarið.

Tilboðini snúgva seg um flogferð og innivist, har til ber at velja millum ymisk hotell, íbúðir, guesthouse, B&B, caravan o.l.

Til ber at leiga bil á teimum ymisku ferðamálnum.

Útferðir og støð, sum eru verd at síggja og royna, eru eisini nevnd í faldaranum.

Sum nakað nýtt í ár verður nú møguleiki at flúgva beinleiðis til London í summar hvønn leygardag í háárstíðini.

Samstundis sum ferðir við Atlantic Aiways verða bílagdar, ber til at bíleggja atgongurmerki til sangleikir, sjónleikir, fótbóltsdystir, o.a. hjá felagnum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Blása og hava mjøl í munninum

**Edmund Joensen**



Kunsturin at blása og hava mjøl í munninum verður av og á royndur í politikki.

Seinasta fríggjadag var eitt uppskot um at lækka bensinavgjaldið við umleið 5 milliónum krónum um árið til 2. viðgerð á Føroya Løgtingi. Uppskotið átti Hendrik Old, løgtingsmaður.

Andstøðan atkvøddi fyri uppskotinum, og onkur blank atkvøða frá samgongulimum gjørdu, at málið varð samtykt við 2. viðgerð. Áhugavert verður tí at síggja, hvussu leikur fer við 3. viðgerð.

**Óli Breckmann í mjølblástri**
Útvarp Føroya gjørdi nógv burturúr hesum forholdsvís lítla máli, og sendi eina samrøðu við Óla Breckmann, sum gramdi seg dúgliga um Karsten Hansen, landsstýrismann, samgonguskjalið o.s.fr.

Uppskotið sjálvt og upphæddin eru ikki tað áhugaverda í hesum føri. Tað sum er sera áhugavert, er at síggja hvussu formaður Fólkafloksins á tingi, Óli Breckmann, nú bæði fólkatingsval og løgtingsval nærkast, roynir seg í uppgávuni at blása við mjøli í munninum.

Samstundis sum hann slær Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum í høvdi við skattalættum og avgjaldslættum, so hevur sami Óli Breckmann við persónligari undirskrift, saman við samgonguni, lagt uppskot fyri løgtingið, um at avtaka allar ríkisveitingar yvir nøkur fá ár. Sambært uppskotinum verður byrjað við at lækka heildarveitingina við 300 – 400 milliónum krónum longu á komandi fíggjarlóg.

Hetta stendur svart uppá hvítt í uppskotinum hjá samgonguni. Løgmaður hevur síðani sagt, at talið skal vera 400 milliónir.

Ei undur í at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kikkar eftir ondini við hvørt.

**Samfelagsmenningin steðgar**
Í sambandi við nýggjastu útmelding landsstýrisins og samgongunar, settu vit í Sambandsflokkinum nøkur skilafólk í samráð við óheft búskaparfólk at gera eina meting av framtíðar fíggjarætlan Føroya Løgtings. (sí talvu niðanfyri).

Allar útrokningar eru í føstum prísum (t.v.s. at inflatión er ikki íroknað), og roknað er við eini lækking av blokkinum á 300 milliónir krónir, og ikki við 400 milliónum sum løgmaður nú hevur boðað frá. Um landsstýrið heldur seg til tær 400 milliónirnar, gerst kaosið sjálvandi somikið størri.

Sí talvu!
Føroyska samfelagið fær við ætlan landsstýrisins eitt satt skot fyri bógvin, sum ger at øll samfelagsmenningin steðgar. Tey sum hava sæð fram til nýtt Suðuroyarskip, útbygging av fløgvøllinum í Vágum, útbygging av sjúkrahúsi, undirsjóvartunnlar og aðrar íløgur, gera best í heldur at venja seg við tankan um hægri skatt og avgjøld ístaðin og eina munandi lægri fíggjarlóg við teimum stóru samfelagsligu avleiðingunum, sum hetta náttúrliga hevur við sær.

**Skilaleyst**
Henda útrokning og framrokning av landsstýrisins ætlan vísir í turrum tølum okkum øllum, hvussu skilaleys ætlanin hjá sitandi landsstýri og samgongu er.

Tað er tí væl skiljandi, at løgtingsmenn meira enn fyrr royna at gerast uppaftur betri í kunstinum at blása við mjøli í munnunum.

**Mett fíggjarætlan Føroya Løgtings fyri árini 2001 til 2007 í føstum prísum**

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 2.508 | 2.500 | 2.400 | 2.448 | 2.497 | 2.547 | 2.598 |
| Ríkisveiting | 993 | - | - | - | - | - | - |
| Stuðul úr búskapargr. | - | 700 | 650 | 600 | 550 | 500 | 450 |
| Inntøkur í alt | 3.501 | 3.200 | 3.050 | 3.048 | 3.047 | 3.047 | 3.048 |
| Útreiðslur | | | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 2.753 | 2.808 | 2.864 | 2.922 | 2.980 | 3.040 | 3.100 |
| Rentur netto | 131 | 125 | 117 | 107 | 95 | 81 | 65 |
| Yvirtøkur | - | 25 | 25 | 35 | 35 | 100 | 100 |
| Íløgur | 198 | 198 | 198 | 198 | 198 | 198 | 198 |
| Útreiðslur í alt | 3.082 | 3.156 | 3.204 | 3.262 | 3.308 | 3.419 | 3.463 |
| RL úrslit | 419 | 44 | -154 | -214 | -261 | -372 | -415 |
| Avdráttir | 136 | 142 | 150 | 160 | 172 | 186 | 202 |
| Likviditetsúrslit | 283 | - 98 | - 304 | - 374 | - 433 | - 558 | - 617 |

# Nýggjur formaður í Maskinmeistarafelagnum

TÍÐINDASKRIV
*Maskinmeistarafelagið*

Maskinmeistarafelagið hevði aðalfund leygardagin tann 24. mars.

Á skránni var m. a. formansval og nevndarval.

Jógvan Nybo á Viðareiði var einasta valevni til formansvalið og var hann sostatt valdur. Hann tekur við eftir Niels Th. Pedersen sum hevur verið formaður síðani 1. januar í ár, tá ið formaðurin seinastu árini Finnleif Guttesen bleiv borgarstjóri á Tvøriyri.

Fyri vali til nevndina stóðu Frimodt Rasmussen, Gudmar Danielsen og Tummas Eli Joensen.

Frimodt Rasmussen og Gudmar Danielsen tóku ikki við afturvali.

Tummas Eli Joensen var afturvaldur og nývaldir í nevndina vóru Regin Olsen og Páll Hansen.

Sum tiltakslimir vóru valdir Tórbjørn Bæk og Jóan Pauli Jacobsen.

Á nevndarfundi tann 30. mars var Zacharias Zachariasen afturvaldur til næstformann.

Sostatt er nevndin í Maskinmeistarafelagnum nú soleiðis skipað:
Jógvan Nybo, Viðareiði er formaður
Zacharias Zachariasen, Skopun er næstformaður
Tummas Eli Joensen, Strendur,
Regin Olsen, Klaksvík og Páll Hansan, Tórshavn eru nevndarlimir.

# Fader vor

**Gunnar Joensen**

Når man kan komme til Gud og kan be' til Gud, så må man tro at han er til. Vi skal gennemgå Fader vor.

**Fader vor du som er i himlen** – Gud ber os komme til sig som børn der kommer til sin fader, intet er for stort og intet er for lille til at komme til ham med. Det er det fortrolige forhold mellem fader og søn, som Gud ønsker af os. Vor fader han bor i himlen og er hævet over os alle.

**Hellige vorde dit navn** – Gud er hellig og ingen synd kan komme i nærheden af ham.

**Komme dit rige** – han vil have at hans rige skal komme til os, det er kommet gennem Kristus Jesus, der døde på korset for os langfredag. Han kom som syndeoffer for at bøde vores synd, og frelse er ikke i noget andet navn end Jesus. Riget er kommet og består af det hellige samfund blandt mennesker der tror på Gud.

**Ske din vilje, som i himlen som på jorden** – der er ingen tvivl om at Guds vilje sker, både i himlen og på jorden, spørgsmålet er kun om vi vil være underlagt hans vilje.

**Giv os i dag vort daglige brød** – uden brød kan vi ikke leve på jorden, det er en umulig sag, men det er ikke alle der har det daglige brød; men har vi husket at takka for brødet. Ber' du bordbøn når du spiser, eller er det bar en selvfølgelig hed for dig at du får mad. Da jøderne var i ørkenen på vej fra Egypten til det hellige land, måtte de spise mad givet fra Gud, kaldt for Manna. De skulle sanke det hver dag, kun til den dag, for ingen kender dagen i morgen. Det er vigtigt at du savner brød hver dag, i åndelig betydning, ved at læse i bibelen for at få åndelig føde. Det er meget vigtigt at gøre det hver dag.

**Og forlad os vor skyld, som vi forlader vores skyldnere** – vi står alle i gæld til Gud, men Jesus betalte gælden for os, så det er at tage imod hans nåde, så man kan være gældfri. Så vi må be' til Gud om at forlade os vores skyld, men han ber' os samtidig forlade vores skyldnere, det er straks værre. At forlade en, der har gjort én uret, det er meget svært, men det skal gøres. Hvis vi ikke forlader vores skyldnere, kan Gud heller ikke forlade vores skyld.

**Led os ikke i fristelse** – Gud frister ingen, og lader sig ikke friste af nogen, det viste Jesus ude i ødemarken, da han blev fristet af djævelen, han stod tilbage med Guds ord, og så kom englene til ham og tjente ham.

**Fri os fra det onde** – Gud vil fri os fra alt ondt, om vi lader ham lede os. Det onde kan komme i mange skikkelser, det mest almindelige er hovmod og selvtilstrækkelighed, så det skal vi vare os for.

**Thi dit er riget, magten og æren i evighed, Amen.** Æren er Guds alene, og magten er hans, ligeså. Ham skal vi gi' al ære, det tilkommer ham.

Må Gud velsigne disse ord, som jeg har skrevet, og lad det bære frugt til evig frelse. Må Gud velsigne det færøske folk, og lad os endelig gi' os hen til Gud og hans varetægt. Må Gud velsigne jer alle, der læser disse ord.

# Konsert í Christian skirkjuni

TÍÐINDASKRIV
*Klaksvíkar Musikkskúli*

Í hesum døgum hevur Klaksvíkar Musikkskúli vitjan av einum symfoniorkestri frá Odensen Musikskole.

Tey skulu hava konsert í Christianskirkjuni í kvøld kl. 20.00 og í Kommunuskúlaskálanum hóskvøld 12. apríl kl. 19.30. Í orkestrinum eru uml. 50 næmingar í aldrinum 10-19 ár.

Á skránni hjá teimum er m. a. Per Gynt suitan av Grieg, Holberg suitan og 1. satsur av violinkonsert í G-dur av Mozart.

Leiðari av orkestrinum er Uffe Most, sum eisini er leiðari av Odense Musikskole.